

## Føroyar tvey pláss niður

Føroyska fótbóltslandsliðið er farið tvey pláss niður á seinasta styrkislistanum hjá FIFA. Altjóða fótbóltssambandið ger hvønn mánað eina uppgerð yvir allar heimsins fótbóltstjóðir, og á listanum eru 207 lond. Hendan mánaðin eru Føroyar nummar 187. Bert eitt europeiskt land er aftanfyri Føroyar, og tað er San Marino. Tað hevur gingið støðugt aftur á hjá Føroyum á listanum seinastu árini.

## Sterk lond í okkara EM-bólki

Sambært styrkislistanum hjá FIFA spæla Føroyar ímóti nøkrum av heimsins sterkastu fótbóltstjóðum í undankappingini til EM. Ovast á listanum eru heimsmeistararnir Italia, sum koma til Føroya at spæla fyrst í juni. Frakland er nummar 4. Ukraina, sum vitjar í Føroyum seinni í hesum mánaðinum, er nummar 11 á listanum. Georgia, sum Føroyar eisini spæla ímóti í mars, er nummar 86 á styrkislistanum hjá FIFA.

# 14 stig í 8 dystum

**Talan er um framúr avrik hjá Kyndli, nú liðið hevur spælt seg í FM-finaluna**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var nú ikki tað, sum Kyndils-viðhaldsfólkini mundu droyma um, tá tey vaknaðu mánamorgunin 8. januar. Kyndil hevði tá tapt fyrsta dystin í endaspælinum móti H71. Og sum um hetta ikki var nóg mikið, so var liðið á aftasta plássinum í Atlantic Airways-kappingini.

Tað var greitt, at nakað serligt skuldi til, og hetta hevur Kyndil so sanniliga leverað síðani. Tvær ferðir hevur liðið spælt javnleik móti KÍF, men í aðrar mátar hevur talan bert verið um sigrar. Og fleiri av hesum á sannførandi hátt, har vilji og skjótt spæl hava køvt royndunum hjá mótstøðuliðunum.

Sum so er eingin dystur týdningarmiklari enn nakar annar, men skulu tvær uppgerðir takast framum, so eru tað helst útidysturin móti StÍF og heimadysturin móti VÍF. Á Skála hevði Kyndil veruliga knívin á barkanum, men liðið reisti seg við einum tryggum sigri.

Í heimadystinum móti VÍF tóktust gestirnir stýra væl og virðiliga móti sigrinum, men seinastu 10 minuttirnar vendi Kyndil øllum í berum treiskni. Tvey avrik, sum veruliga sýna mentalu styrkina, sum Kyndil tykist hava.

Og so kann til stuttleikar nevnast, at meðan seinastu 8 dystirnir altso hava givið 14 stig, so góvu teir fyrstu 11 bert sjey av slagnum.

Og við listanum niðanfyri í huga er einki løgið, at Hans Áki Dal Christiansen eftir dystin staðfesti:

- Sjálvsálitið hjá okkum er í topp. Og vit ivast ikki í, at vit kunnu fara allan vegin.

**Endaspælið hjá Kyndli:**

| | | |
|---|---|---|
| 07.01 | H71-Kyndil | 30-28 |
| 14.01 | Kyndil-Neistin | 35-30 |
| 20.01 | KÍF-Kyndil | 34-34 |
| 28.01 | StÍF-Kyndil | 26-31 |
| 03.02 | Kyndil-VÍF | 35-30 |
| 18.02 | Kyndil-H71 | 33-25 |
| 25.02 | Neistin-Kyndil | 25-33 |
| 04.03 | Kyndil-KÍF | 31-31 |
| 11.03 | Kyndil-StÍF | 30-22 |
| 18.03 | VÍF-Kyndil | ??-?? |

**Støðan tann 8. januar**

| Nr. | Lið | Stig |
|---|---|---|
| 1 | VÍF | 11 |
| 2 | StÍF | 7 |
| 3 | Neistin | 6 |
| 4 | KÍF | 5 |
| 5 | H71 | 5 |
| 6 | Kyndil 4 | |

## Kykmyndir

Brot úr dystinum og samrøður eru at síggja sum kykmynd á www.portal.fo

Kyndil-StÍF 30-22 (16-13)

# Klárt til FM-endurtøku

**Kyndil hølvaði seinastu FM-vónina úr StÍF sunnudagin. Við sigrinum eru teir nú til reiðar at spæla FM-finalu móti VÍF annað árið á rað**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Umstøðurnar vóru til hondbóltsveitslu. Ein rokandi full høll av áskoðarum. Tvey lið, sum óteljandi ferðir levera ein knalldyst sínamillum. Og ikki minst spenningurin um FM-finaluna, sum bæði liðini høvdu møguleika at røkka.



*Stríðsviljin hjá Hans Áka Dal Christiansen og liðfeløgunum í Kyndli tóktist munandi størri, enn hann var tað hjá Borgari Danielsen og StÍF*

*mynd: Álvur*

### Veitslan var bara hálv

Men hóast gestirnir soleiðis komu í hópatali, og hóast borðreitt var til tað heilt stóra brakið, so gjørdist veruliga veitslan tó av ongum. Ella kanska skuldu vit bara sagt, at veitslan varð hálv.

Tí tað var bert grøni parturin av høllini, sum veruliga var í veitsluhýri. Tey hvítu og reyðu larmaðu kanska í løtum, men fyri tað nógva vóru tey vitni til, at strandingar vórðu spældir niður og norð.

Hóast liðini fylgdust stóran part av fyrra hálvleiki, so tóktist Kyndil koma nógv lættari til sínar møguleikar og mál. Spælið var fyri tað nógva væl varierað við Høgna Klein sum væl uppløgdum spælskipara. Ikki minst, tí hesin dugdi at gagnnýta tað pláss og ta tíð, sum skotstyrkin av bakkunum gav.

### Einstreingjað

Og júst hetta var kanska munurin. Nú StÍF aftur hevur at kalla alt fólkið tókt eftir skaðar, telur bakketan nakrar av skotsterkastu spælarunum í landinum. Leivur Justinussen, Finnur Hansson og Sveinur Justinussen kunnu allir á einum góðum degi avgera ein hondbóltsdyst, og við Jakob Jónsson at stuðla uppundir, er eisini rúm fyri hvíld hjá bakspælarunum.

Tað skuldi lagt upp til, at StÍF veruliga kundi leggja trýst á í álopspartinum, og antin spæla tunt ella inn á strikuna, men hetta hendi alt í verðini ov sjáldan. Heldur royndu skotsterku spælararnir hvør í sínum lagi at avgera dystin. Og tá so er, so endar tað aloftast við, at eingin teirra avger nakað sum helst. At Finnur hevði einar tvær mest sum genialar fríspælingar á inn á strikuna til Mortan, vigar ov lítið í so máta. Botnlinjan staðfesti, at liðavrikið hevði verið ov veikt. Og í øllum førum væl minni enn tað, sum StÍF hevur havt sum eyðkenni, tá liðið er partur av steypafinalu.

### Høvdu yvirskotið

Seinna korterið av fyrra hálvleiki hóttu teir grønu eisini veruliga við at fara avstað, men StÍF fekk kortini toga seg aftur. Marian byrjaði veruliga at spæla seg upp, og millum annað tók hann sær av tveimum brotskøstum. Samstundis megnaðu teir í hinum endanum at stríða seg ígjøgnum nøkur gjøgnumbrot, men tað stóð tó greitt, at hetta kostaði nógva orku. Ikki minst, tí liðið eisini spældi í undirtali stóran part av fyrra hálvleiki.

Og kropsliga yvirskotið, sum hetta kravdi, tóktust teir ikki hava seinna hálvleik. Kyndil sýndi hinvegin, at teir í løtuni hava eitt sálarligt yvirskot, og sjálvsálitinum í hesum megnaðu strandingar als ikki at standa ímóti.

### Náddu fjart mál

Og tá teir so eisini byrjaðu at gera alt fleiri óprovokerað mistøk, skrádnaði fullkomuliga. Kyndilin logaði alsamt sterkari í høllini, og tað var fult uppiborið, at grøni hópurin eftir seinasta bríksl kundi dansa sigursdans á miðjum vølli. Finaluplássið, sum tóktist veruleikafjart fyri tveimum mánaðum síðani, er rokkið. Og sum liðið koyrir í løtuni, eru teir helst størri favorittar enn VÍF, tá sjálvir finaludystirnir standa á skránni.

Kanska var tað ein lítil skeina, at Lars Black yvirreageraði, tá hann púrasta óviljað varð skotin í høvdið av Leivi Justinussen. Tað ber við sær, at málverjin er leikbannaður undan finaluupphitingini móti VÍF, men júst tann dysturin er í løtuni nakað væl minni týdningarmikil, enn flestu dystirnir millum feløgini bæði eru tað.

## FAKTA

**Kyndil-VÍF 30-22 (16-13)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Ken Zachariasen 9(4), Høgni Klein 7, Rókur Akralíð 6, Hanus Johansen 4, Janus Einar Sørensen 3, Hjalti M. Jacobsen 1, Hans Áki Dal Christansen 1
**StÍF:** Leivur Justinussen 6(4), Mortan Hansen 4, Sveinur Justinussen 3, Jacob Jónsson 3, Bárður Danielsen 2, Finnur Hansson 2, Bent Djurhuus 2
**Brotskøst:** Kyndil 6, StÍF 4
**Útvísingar:** Kyndil 4, StÍF 7
**Diskvalifikatión:** Kyndil 1 (Beinleiðis reytt)